

## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum
Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

# Varaskúlastjórastarv í Tofta skúla

Vegna farloyvi verður starvið sum varaskúlastjóri í Tofta skúla lýst leyst. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. august 2007 til 31.07.2008.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum:**

- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**

- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv:**

Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13.apríl kl. 13.00.

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur komandi skúlaár uml. 190 næmingar í 1. – 10.fl. og um 20 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof

VESTMANNA KOMMUNA

# PEDAGOGUR

## til Látipípuna

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða í 30 tímar um vikuna.

Látipípan er ein stovnur við plássi til 22 útibarnagarðsbørn og frítíðarstovubørn í 1. og 2. flokki.

Starvið er í frítíðarstovuni.

**Vit kunnu bjóða:**

- Ein stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjøru.
- Ein fittan vælvirkandi bólk av børnum.
- Góðan starvsfólkabólk.

**Vit vænta av tær:**

- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, eins væl og í bólki.
- Tú hevur góð samstarvsevnir.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin fram til 30.06.07.

Nærri fæst at vita við at ringja til Maluna Stórá leiðara á tlf. 230145.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivlig umsókn við prógvi og møguligum viðmælum verður at senda til Vestmanna Kommunu í seinasta lagi hósdagin 12.04.2007.

LÁTIPÍPAN




> Telefonráðgeving
> Anonymitet
> Tagnarskyldu
> Stundir at lurta

www.blakross.fo

Bláí Krossur







## Fa. ALT KANN GERAST

Søkt verður eftir tveimum timburmonnum at byrja skjótast til ber.

**Vinarliga ring 59 59 57**